## Stjórin fer

Rakstrarstjórin í íslendska lágprísflogfelagnum Sterling, Stefan Vilmer, hevur sagt upp, tí hann hevur fingið starv hjá írsk-sveisiska flogfelagnum JetBird AG, sum eisini er eitt sokallað lágprísfelag. JetBird AG er í sera stórari framgongd og skal hava fleiri nýggj flogfør tey bæði næstu árini. Felagið brúkar internetið sum sølustað hevur sett sær sum mál at fáa marknaðarprísirnar á privat- og vinnuferðum við smáum flogførum niður í helvt.

## Vindmyllur ov dýrar

Danska orkufyritøkan DONG hevur gjørt av at taka seg burtur úr einari ætlan um at seta fleiri vindmyllur upp á sjónum við Rødsand. Niels Bergh-Hansen, aðalstjóri, sigur við Ritzau, at tær stóru vindmyllurnar, sum verða brúktar á sjónum, eru dýrkaðar eini 50 prosent tey bæði seinastu árini, og tað heldur DONG vera í meira lagi. Tí hevur felagið slept Rødsand-ætlanini og fer heldur at leggja dent á vindmyllur uppi á landi, sigur stjórin.

# koma av útoyggj





- Tess størri vágin er, tess størri er kravið til trygdina, sigur Bjarni Olsen

*Royndirnar aðrastaðni frá vísa, at stuðlað virksemi missir so við og við sín geist og haraftrat sítt kappingarføri. Tí siga vit, at tað krevur eldhug at leggja tøkan pening á borðið*

*Tess størri fjarstøða frá størri bygdunum og tess verri ferðasambandið er, tess truplari er at fáa vinnuligt virksemi at bera seg*

við somu treytum.

- Her er tí ikki talan um at hava illvilja ella fordómar ímóti virksemi á útoyggj, men ein heilt natúrligur samanhangur innan rakstrurin, sigur Bjarni Olsen, og slær síðani fast:

- Tess størri fjarstøða frá størri bygdunum og tess verri ferðasambandið er, tess truplari er at fáa vinnuligt virksemi at bera seg!

### Stuðul sum sovipúta

Skal ein fara undir virksemi á útoyggj er neyðugt at fáa lán og helst eisini almennan stuðul.

Júst hetta við stuðlinum hevur mangan víst seg at verið ein trupulleiki: Hesin kann lættliga gerast ein sovipúta hjá virkisfúsum fólki.

Tað vísir seg mangan, at tað ikki er serliga motiverandi hjá fólki at skula liva av virksemi sum fær fíggjarligan stuðul frá tí almenna. Her átti ein heldur at skipa ein grunn, sum við serligum treytum kundi útvega eginpening til útoyggjar.

- Royndirnar aðrastaðni frá vísa, at stuðlað virksemi missir so við og við sín geist og haraftrat sítt kappingarføri.

- Tí siga vit, at tað krevur eldhug at leggja tøkan pening á borðið, tá ein veruliga trýr uppá verkætlanina, sigur hann.



*Neyðugt er at hava gott ferðasamband til útoyggjarnar. Men hetta merkir ikki automatiskt at vinnuligt virksemi verður skapt.*
*– Hetta gevur í øllum førum møguleika at búgva á einum staði og at arbeiða á einum øðrum, sigur Bjarni Olsen*
Mynd: Jens Kr. Vang

## Gott ferðasamband neyðugt

Á útoyggj standa tey yvirfyri bæði styrkjum og veikleikum: Styrkin er millum annað at finna í mentanini, søguni og náttúruni, meðan veikleikarnir eru at finna í tí, at tað er keðiligt og at tey ungu ikki á trívast á útoyggj og smáplássum í síni heild.

Til ber jú ikki at tvinga fólk at búseta seg á útoyggj, men ein avgjørd fortreyt er at ferðasambandið og vegasambandið eru góð.

- Hinvegin má ein staðfesta, at gott vegasamband ikki merkir tað sama sum at virksemi verður skapt.

- Men tað gevur í øllum førum møguleika at búgva á útoyggj og hava sítt arbeiðspláss aðrastaðni, sigur Bjarni Olsen.

Eitt dømi um hetta er Gásadalur.